

*Tey, sum ætla sær við Norrønu á páskum, men ikki enn hava tryggjað sær ferðaseðil, noyðast at gera skjótt av, tí skipið er við at fyllast páskatúrarnar.*

*savnsmynd*

# Norrøna við at fyllast páskatúrarnar

**Áhugin fyri páskaferðunum hjá Norrønu er sera stórur, og á Smyril Line verður upplýst, at skipið er við at fyllast**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Smyril Line hevur aftur í ár lagt seg eftir at bjóða føroyskum familjum pakkaferðir til Danland frítíðarmiðdeplarnar, og hetta hevur víst seg at geva úrslit.

### Sera stórur vøkstur

Hendrik Egholm, marknaðarleiðari hjá Smyril Line, sigur, at tað hevur gingið serstakliga væl við pakkaferðunum á páskum.

– Vit hava tveir túrar, sum vit rópa fyri páskatúrar, og tann fyrri av teimum, sum er av Havnini 6. apríl, er næstan fullur, meðan tað er eitt sindur betur pláss á túrinum, sum er eina viku seinni. Í fjør gekk einki serligt við páskatúrunum, men í ár hevur tað gingnið avbera væl, so vøksturin er sera stórur, sigur Hendrik Egholm, sum væntar, at túrarnir skjótt fara at verða útseldir.

Royndirnar hjá Smyril Line vísa, at føroyskar barnafamiljan dámar sera væl at ferðast á tann hátt, at farið verður við bili til Danmarkar, har gist verður á frítíðarmiðdepli við alskyns hentleikum, og hetta slagið av ferðum vinnur støðugt fram, verður upplýst hjá Smyril Line.

# Friðarligt hjá løgregluni

**Hetta hevur – tíbetur kunnu vit siga – verið eitt stak friðarligt vikuskifti hjá løgregluni kring landið. Á støðini í Havn hevur okkurt smávegis verið fráboðað – herverk, rúsdrekkakoyring o.a., meðan á løgreglustøðunum á Tvøroyri og í Runavík hevur at kalla einki verið at gjørt**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*



*Hesin rennikravarin varð stolin í Hoyvík um vikuskiftið og førdi við sær herverk á 30.000 - 50.000 krónur*

Fríggjakvøldið tók løgreglan í Havn nakrar smádreingir fyri herverk. Teir stuttleikaðu sær við at mála grafitti á ein vegg í Jóanesar Paturssonargøtu. Tað verður tó ikki gjørt nógv við málið, tí talan var um smádreingir. Men dreingirnir fáa ein lyftan fremstafingur, og foreldur og barnavernd fáa eisini kunning um málið.

### Herverk fyri tíggjutals-túsund

Fríggjakvøldið varð somuleiðis umfatandi herverk í eini útstykking í Hoyvík. Fólk høvdu brotið inn í nakrar arbeiðsskúrar. Men verri er, at tey stjólu eisini ein rennigravara og koyrdu runt í útstykkingini við honum. Tað førdi til brotin kloakkrør og aðrar oyðileggingar.

Løgreglan metir, at talan er um herverk fyri einar 30.000-50.000 krónur, leyðsliga mett, so avgjørt ein dýrur koyritúrur.

### Legði nummarið eftir til løgregluna

Leygarkvøldið tók løgreglan í Havn ein bilførara, sum verður skuldsettur fyri at koyra við kenning.

Løgreglan fekk fráboðan um, at ein bilur hevði rent á eitt skelti uppi í Hoyvík, men at førarin var rýmdur av staðnum við bilinum. Málið varð kannað, og tá ið løgreglan kom á staðið, kundi hon ikki annað enn ásanna, at bilførarin var rýmdur av staðnum.

Men bilførarin var so óheppin og løgreglan so heppin, at tá ið bilførarin rendi á skeltið, datt nummarplátan av bilinum og lá eftir niðurvið skeltinum.

Við nummarplátuni í hondini var skjótt hjá løgregluni at finna tann, sum átti bilin, og hann varð síðani tikin. Illgruni er um, at bilførarin ikki var edrúur og verður sostatt skuldsettur fyri at koyra við kenning.

### Flúgvandi takpláta

Í Runavík hevur vikuskiftið eins og í Havn verið rættiliga friðarligt. Tó var ein heldur sermerkt hending á skránni leygarnáttina, tá løgreglan koyrdi til Leirvíkar. Tá løgreglumenninir komu til brennistøðina, kom brádliga ein takpláta flúgvandi við fullari ferð beina kós móti bilinum. Sum vera man hvukku løgreglumenninir við, men komu tó so heppisliga fyri, at takplátan tíbetur varð føst í einum pela. Sløkkiliðið kom alt fyri alt á staðið og staðfesti síðan, at takplátuna átti NCC í Leirvík.




Vika 11 2006

# Góð tíðindi úr USA stuðla evropiskum partabrøvum

MARKNAÐARRÁK

Fastir lesarar av Marknaðarráki vita, at búskapargongdin í t.d. USA eisini ávirkar virðisbrøv á okkara leiðum. Í farnu viku fingu vit enn eina ábending um, at amerikanski búskapurin enn er í góðum standi. Síðan búskaparvøksturin (BTÚ) toppaði har í 2004 við 4,7% í mun til árið fyri, er hann javnt og samt slakkaður av. Fjórða ársfjórðing 2005 var hann komin niður á 3,2%. Vøksturin í BTÚ verður bert kunngjørdur 4 ferðir um árið, og tí hyggja búskaparfrøðingar eisini eftir einari rúgvu av øðrum hagtølum, sum verða kunngjørd títtari, og sum kunnu geva ábendingar um búskaparvøksturin. Ein tann týdningarmesta kunngerðin av hesum er tann mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin. Har verður serliga hugt at, hvussu nógv n‡ggj størv koma til, umframt tekin um lønarvøkstur. Fríggjadagin kom kunngerðin fyri februar mánað. Hon var betur enn væntað, við 243.000 n‡ggjum størvum. Hetta fekk evropisk partabrøv at hækka 1%.

### Lánsbrævarentur hækka enn

Í farnu viku hildu lánsbrævarenturnar á at hækka. 10-ára danska rentan hækkaði 0,11%-stig, og er nú hækkað um 0,50%-stig síðan miðan januar. Hendan gongdin sær út til at halda fram komandi vikurnar.

### Partabrøv

Aftaná góðuarbeiðsmarknaðarfrágreiðingina úr USA fríggjadagin hækkaðu partabrøv. Norrøni partabrævamarknaðurin hækkaði 0,5% og liggur nú á hægsta stigi síðan 2000. Bankarnir stóðu seg væl, og finsku skógarpartabrøvini, Stora Enso og UPM hækkaðu umleið 9%. Hetta var vegna tíðindi um keyp av stórari pappírsverksmiðju í Brasilia, umframt eina uppmeting frá bankanum UPS av hesum partabrøvum. Hesa vikuna verða eyguni m.a. vend móti Group 4 Securitas og Top Danmark ið kunngera roknskap. Mærsk er eisini áhugavert hesa vikuna, orsakað av tíðindum um møguligt keyp av nøkrum bingjuhavnum í USA.

### Hesa vikuna

Hendan vikan verður eisini full av hagtølum, sum hava t‡dning fyri fíggjarmarknaðirnar. Tað verður mest USA, sum verður í andgletti. Haðani koma tøl fyri prísvøkstur, smásølu og ídnaðarframleiðslu.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 626,43 | 1,1% | ↑ |
| JPY | 5,26 | -1,1% | ↓ |
| GBP | 1.081,22 | -0,6% | ↓ |
| NOK | 93,51 | 0,2% | ↑ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 102,12 | -0,2% | ↓ |
| Evru lánsbrøv | 170,23 | -0,5% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 116,42 | 1,5% | ↑ |
| Altjóða vøkstur | 73,41 | -1,4% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*